# ítróttur

Nr. 236 • hósdagur • 11. desember 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

**1. Deild kvinnur**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Stjørnan | 10 | 8 - 1 - 1 | 249 | 184 | 65 | 17 |
| 2 | VB | 10 | 8 - 0 - 2 | 259 | 180 | 79 | 16 |
| 3 | VÍF | 10 | 6 - 1 - 3 | 241 | 214 | 27 | 13 |
| 4 | Neistin | 9 | 4 - 1 - 4 | 228 | 207 | 21 | 9 |
| 5 | StÍF | 10 | 4 - 1 - 5 | 234 | 257 | -23 | 9 |
| 6 | Søljan | 9 | 1 - 0 - 8 | 153 | 214 | -61 | 2 |
| 7 | Kyndil | 10 | 1 - 0 - 9 | 158 | 266 | -108 | 2 |

# Magni á Lakjuni aftur í ÍF

**Bartal Eliasen sigst eisini at vera á veg til Fuglafirðar, har teir nú halda seg hava nóg góðar manningarligar fyritreytir at fara undir stríðið um at standa seg í bestu deildini**

ÍF FYRIREIKING
*Jóannes Hansen*


*Magni á Lakjuni hevur seinnu árini leikt við HB, B36 og EB/Streymi, men nú leitar hann aftur til heimbygdina og ÍF*

Í gjárkvøldið skuldi spælarafundur vera í Fuglafirði. Á skránni var fótbóltsárið 2004. Sigfríður Clementsen fer at halda fram sum venjari hjá ÍF. Hjálparvenjari hjá honum verður Bogi Lervig. Síðsta kappingarár var hann venjari í Leirvík. Bogi er fuglfirðingur og hevur frammanundan tvey ára skeiðið í Leirvík bæði spælt og verið venjari hjá ÍF, har hann hevur tikið sær av unglingunum og 3. deildarliðnum. Nú er ætlanin, at hann burturav skal hjálpa Sigfríði Clementsen við 1. deildarliðnum.

Umframt venjarasíðuna hava teir í Fuglafirði eisini so at siga fingið spælarasíðuna upp á pláss. Fimm nýggir spælarar – summir av teimum eru gamlir kenningar – fara at vera við í kappingini um plássini á besta liðnum hjá ÍF.

Harvið tykjast fuglfirðingar ætla sær meiri enn bara at stríðast fyri at sleppa undan niðurflyting, tá ið teir næsta ár aftur fara at spæla í bestu fótbóltsdeildini. Nú er tað greitt, at Magni á Lakjuni fer at hjálpa teimum. Eftir at hann hevur verið burtur frá barndómsfelagnum síðani eftir kappingarlok í 1997 er álopsspælarin aftur á heimabeiti. Hetta varð greitt týsdagin, tá ið ÍF og Magni skrivaðu undir samstarvsavtalu. Magni spældi síðsta kappingarár við EB/Streymi. Frammanundan hevði hann verið í B36 og HB.

Í gjár varð nevnt, at Karstin Joensen, sum í fjør var málverji hjá KÍ, skal spæla við ÍF næsta ár. Frammanundan var greitt, at Rúni Elttør, sum í fjør var í B36, skal spæla við ÍF, og fuglfirðingar hava meiri í posanum. Tað er ikki greitt, um Bárður á Lakjuni yvirhøvur fer at spæla fótbólt næsta ár. Um hann fer at spæla, so verður tað við barndómsfelagnum í Fuglafirði. Bárður spældi síðsta kappingarár við GÍ.

Tað ljóðar eisini, at Bartal Eliasen, sum tey seinastu árini hevur spælt við GÍ, skal umboða barndómsfelagið í Fuglafirði. Tað ber ikki til at fáa hetta síðsta váttað, men vit skilja á lagnum, at alt bendir á, at Bartal verður í ÍF verjuni næsta kappingarár.

## Eru komnir á mál

Rógvi Róin hevur havt ábyrgdina av samráðingunum við spælararnar.

– Tá ið tað var greitt, at ÍF aftur fór at vera við í fremstu røð, vóru vit nakrir, sum settu okkum fyri at hjálpa felagnum hjá okkum. Nevndin hevur staðið fyri samráðingunum við venjararnar, og stuðulsbólkurin hevur tikið sær av at tosa við spælararnar. Málið hjá okkum var at fáa allar teir, sum í fjør vóru á góða liðnum, ið vann 2. deild, at halda fram í felagnum, og at fáa fimm spælarar afturat. Tað mettu vit vera neyðugt. Bæði fyri at fáa fleiri spælarar, ið hava royndir úr 1. deild, og fyri at fáa størri breidd í kappingina um plássini á besta liðnum. Síðsta kappingarár gekk tað væl, tí liðið so at siga varð spart fyri leikbann og skaðar, men vit hava mett, at tað næsta ár verður neyðugt við fleiri spælarum, og vit hava rokkið málinum, sum vit miðaðu eftir, sigur Rógvi Róin.

Rógvi hevur spælt nógv við ÍF, og hann hevur seinnu árini stuðlað felagnum á so mangan annan hátt eisini. Eitt árið var hann formaður, hann hevur tikið sær av leikskráunum, hann hevur verið við til at skipa fyri stevnum og tiltøkum, og nú hevur hann saman við øðrum verið við til at tryggja felagnum spælarar, sum teir halda hava góðan møguleika at tryggja ÍF framtíð í bestu deildini.

– Vit miðjaðu fyrst og fremst eftir at fáa fuglfirðingarnar, sum tey seinnu árini hava spælt aðra staðni, aftur til ÍF. Tað hevur eydnast væl. Onkrir eru bundnir at øðrum feløgum eisini næsta kappingarár. Í práti við fleiri teirra hava vit kent, at teir vísa barndómsfelagnum ans, og vit hava harvið góðar vónir um, at felagið eisini næstu árini fer at hava manningarligt grundarlag fyri at standa seg í 1. deild. Nú ræður um hjá spælarunum og venjarunum at arbeiða væl og miðvíst. Vit hava ikki aðrar orsøkir enn at halda, at tað fara teir at gera, og vit vóna, at tað fer at síggjast aftur á úrslitunum. Sjálvandi vita vit, at tað fer at taka sína tíð hjá ungu og evnaríku monnunum, sum ongantíð áður hava roynt seg í 1. deild, at venja seg til ferðina og intensitetin. Men nú eru fyritreytirnar hesum viðvíkjandi væl betri, enn tær vóru, tá ið ÍF fyri tveimum mánaðum síðani vann 2. deild. Øll, sum varða av felagnum, eru rættuliga spent, sigur Rógvi Róin.

Í 1999 flutti ÍF niður úr bestu deildini, og nú brynja teir seg til fyrstu royndina í fremstu røð síðani tá.



Stjørnan-StÍF 34-19 (16-8):

# Stjørnan aftur á toppinum

**Við einum sannførandi avriki hølvaði Stjørnan StÍF ígjøgnum, og nú eru klaksvíkingarnir á odda undan oddabrakinum í Vági komandi vikuskifti**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*


*Annika Ljósstein brýtur her ígjøgnum StÍF-verjuna, og tað var so eingin óvanlig sjón týskvøldið*
*Mynd: SáH*

Stjørnan tykist vera væl fyri, nú tær fara til Vágs at spæla oddadyst móti VB. Júst VB sýndi stóra styrki um vikuskiftið, tá tær hølvaðu StÍF av, og týskvøldið gjørdi Stjørnan teimum so kynstrið eftir.

Longu fyrstu lítlu løtuna royndi Stjørnan at leggja eitt stórt trýst á, men hóast tær lupu avstað, so fingu gestirnir við einum goðum háli togað seg upp á javnt aftur eftir einum korteri.

Men tað var so eisini seinasta ferðin, at samband við ímillum liðini. Frá støðuni, 6-6, øktu tær á heimaliðnum til 16-8, og so var liðugt við nakrari sum helst mótstøðu frá gestunum. Og tá Stjørnan so fyrstu tíggju minuttirnar av seinna hálvleiki skeyt sjey mál á tað, so lá tað í luftini, at talan skuldi gerast um veruligt sorl.

Kanska kundi standurin hjá gestunum eisni verið enn verri, men eftir at hava bygt leiðsluna somikið trygga, setti Stjørnan tó ferðina nakað niður, men tó at StÍF nú betur fekk fylgt við, so megnaðu tær á ongan hátt at koma í nær námind Stjørnuni.

## Klárt til brakið

Við sigrinum hevur Stjørnan lagt seg á odda, nú tveir dystir resta av grundspælinum. Fyrst og fremst tykist tvídysturin her at vera við VB, og um vikuskiftið fellir helst avgerðin um, hvat av liðunum skal enda grundspælið á ovasta plássinum.

Og skal metast eftir úrslitunum seinastu vikurnar, so er einki at ivast í, at talan her er um tey bæði bestu kvinnuliðini í landinum í løtuni. Ikki minst, tí bæði nú eisini hava vunnið í Vestmanna.

Hjá StÍF er lítið at ivast í, at liðið nú fullkomuliga hevur mist takið í oddinum, har liðið annars aftur í ár tóktist hava hug at blanda seg. Enn eru tveir dystir eftir í grundspælinum, men tá annar av hesum er á útivølli móti VÍF, ber illa til at ímynda sær, at tær kunnu nærkast heiðursmerkjunum nakað serligt afturat, áðrenn farið verður undir endaspælið. Tað er einki at ivast í, at missurin av Alinu Olaru hevur vigað tungt í so máta, og so er spurningurin, um hon kann fáa eins stóran týdning fyri Stjørnuna, tá hon kemur til teirra í januar mánaði. Tað líkist í øllum førum ein av teimum faktorum, sum kann gera av, hvar meistaraheitið endar.

## Dysturin í tølum

**Stjørnan-StÍF 34-19 (16-8)**

Málskjúttar

Stjørnan: Annika Ljósstein 7(1), Anna Kristina Samson 7, Joan M. Djordjevic 6(2), Bára S. Klakstein 4, Una Olsen 3, Katarina Stepanov 3, Maria við Neyst 2, Ragna Andreasen 1, Durita Ljósstein 1(1)

StÍF: Beinta Joensen 6, Sunfríð B. Jacobsen 4(2), Milica Ergic 3(1), Anna Maria Berthelsen 3, Poula D. Olsen 2, Paula B. Høgnesen 1

Brotskøst: Stjørnan 6, StÍF 4

Útvísingar: Stjørnan 2, StÍF 2

Dómarar úr Kyndli: Hannis Wardum & Uni Wardum

# Nógv ferðsla á FCK skrivstovuni

**Tveir álopsspælarar hava fingið pappír uppá, at teir skulu halda fram í felagnum, meðan ein er á veg burtur og framtíðin hjá onkrum øðrum tykist ivasom**

FCK SÁTTMÁLAR
*Jóannes Hansen*

Danska fótbóltskappingin er farin í vetrarfrí, men enn er ikki talan um jólafrí á bossa skrivstovunum hjá FCK.

Í vikuni ljóðaði, at 31 ára gamli Peter Møller, sum seinasta árið hevur verið við í kappingini um plássini í FCK álopinum, skal halda fram í felagnum. Sáttmálaskeiðið hjá honum var inntil á sumri í 2004. Nú eru felagið og spælarin samd um at halda fram inntil á sumri í 2006.

21 ára gamli álopsspælarin Jesper Bech skal eisini halda fram í felagnum. Higartil hevur tað ikki eyndast honum at vera við í nøkrum dysti á liðnum í superliguni. Men hann verður mettur at hava stak góð evni, og í FCK leiðsluni siga teir seg ikki ivast í, at hann skjótt fer at gera seg galdandi.

Týsdagin varð tað greitt, at skeiðið hjá Jörgen Pettersson í FCK er lokið. Á nýggjárinum flytir 28 ára gamli svenskarin til Landskrona í Svøríki. Tá ið Jörgen Pettersson í 2002 varð keyptur úr Týsklandi og til FCK, varð tað roknað við, at hann fór at verða rættulig hóttan, og at tað serliga fór at verða Todi Jónsson, sum fór at kenna sviðan av hesum. Men Jörgen Pettersson megnaði ongantíð at spæla seg til fast pláss í FCK álopinum. Á heysti í 2002 royndu teir hann sum framrættaðan miðvallara. Tað tóktist rigga hampuliga væl, men fyrrapartin av hesum árinum var hann heilt nógv skaddur, og í heyst megnaði hann ongantíð at spæla seg á liðið, og hann var sjáldan á beinkinum.

Verjuspælarin Boro Zivkovic, sum FCK fyri tveimum árum síðani keypti úr Silkeborg, vil fegin sleppa burtur úr FCK, tá ið tað í januar aftur verður loyvt at selja og keypa spælarar. Hann hevur fyri tað mesta sitið á beinkinum, og tað tímir hann ikki meiri. Enn er kortini ikki greitt, um hann verður seldur ella ikki.

Í Danmark hvíla teir seg nú. Tað verður farið undir aftur venjingarnar í FCK 12. januar. Todi Jónsson vónar, at hann tá verður førur fyri at venja saman við liðfeløgunum, men enn er hann ikki komin seg eftir skaðan í lærkrikanum, sum hevur hildið honum burtur frá fótbólti síðani mánaðarskiftið september/oktober.

*Ein spennandi greipa …*




**SKIPALISTIN 2004**

hevur lógarkravdan føroyskan álmanakka, streymtalvur og streymkort umframt dagførdar upplýsingar og hópin av nýggjum myndum av føroyska flotanum. Tilfarið í *SKIPALISTANUM* er álítandi og viðkomandi hjá øllum teimum, ið hava áhuga fyri skipi og sjógvi.

***Skipalistin – hentur at hava!***

SKIPALISTIN 2004 kostar **kr. 175,-**
og innbundin **kr. 240,-**




**JOHN DAM**

er ein hin týdningarmesti skiparin og vinnulívsmaðurin í føroysku siglingarsøguni. Hann var undangongumaður í rækjufiskiskapinum, men eisini innan laksa- hemara- og skeljaveiðu gekk hann ótráddar leiðir. Hetta er ein lívssøga um áræði og framskygni, soltnar tíðir og gulltíðir, vónir og vónbrot, eydnu og lagnu. *JOHN DAM* er 400 blaðsíður við hópin av spennandi myndum.

Bókin er innbundin
og kostar **kr. 295,-**

REPROZ

*– Fæst í bókabúðunum*